# Búgvi tapti fyrsta dystin

Búgvi Poulsen tók um vikuskiftið lut í HM-kappingini í Judo, sum verður hildin í Rio de Janeiro. Í fyrsta umfarinum bardist Búgvi móti einum grikka, og longu eftir 16 sekundum var dysturin av. Tá hevði grikkin fingið gott tak á Búgva og fekk kasta hann, og hetta gav fult stigatal. Hetta er fyrstu ferð, at føroyingar hava tikið lut í HM-kappingini. Saman við Búgva var formaðurin í Judosambandinum, Sofus D. Johannesen, eisini við á ferðini.



# Samanleggingar á skíggjan

KL. 18.30 í kvøld á Rás 1 hjá Televarpinum umrøður FSF-varpið ætlanirnar um at leggja fótbóltsfeløgini í Suðuroy saman. Ætlanirnar eru komnar so væl áleiðis, at um limirnir í feløgunum taka undir við at leggja saman, kunnu feløgini í Surðuroy vera vorðin eitt fótbóltsfelag longu í heyst. Gestir í sjónvarpsstovuni eru Jóan Petur Olgarsson, formaður í TB, og Magnus á Stongum, umboðsmaður fyri EB/Streym. Magnus greiðir frá samanleggingini í Sundalagnum, sum hevði við sær, at Sundalagið nú eigur eitt topplið í Formuladeildini.

# Alonso var við í njósning

**Tvífaldi heimsmeistarin í formil 1 Fernando Alonso kendi til njósnaratilfarið, sum McLaren liðið hevði og var til reiðar at brúka hesa vitan, men av tí at hann valdi at vitna móti arbeiðsgevara sínum, fær hann onga revsing**

FORMIL 1
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Hendan vikan fer at standa, sum ein tann svartasta í søguni hjá formil 1 liðnum hjá McLaren-Mercedes. 100 milliónir dollarar í bót og dømdir at missa øll stigini í kappingini um heimsmeistaraheitið fyri lið, er ikki hissini revsing, men sambært forsetanum í motorítróttarfelagsskapinum FIA, skal McLaren prísa seg lukkuligan um, at revsingin var somikið lin. McLaren hava sambært Max Mosley hunddálka kappingina um meistaraheitið í ár, og FIA umhugsaði at senda liðið til hús, og biðja tey um ikki at vísa seg aftur fyrr enn í 2009, um liðið enn var til, til tað tíð. Hetta váttar eisini formil 1 forsetin, Bernie Ecclestone.



*Fernando Alonso sleppur framvegis at koyra. Men eisini hann stendur í fokus í stóru gøluni, sum hevur rakt Formil 1 kappingina*
*Mynd: Polfoto/AP*

### Alonso visti um njósning

Teir báðir koyrararnir hjá McLaren liðnum eru ikki raktir av revsingini, tí teir sambært FIA valdu at samstarva við kappingardómstólin. Hetta merkir tó ikki, at teir eru fullkomiliga ósekir, Millum annað bar BBC tíðindi um, at dómstólurin hevði útskriftir av teldupostsamskifti millum heimsmeistaran Fernando Alonso, royndarkoyraran, Pedro de la Rosa og McLareb høvuðssniðgevan Mike Coughlan, har teir tosaðu um, hvussu teir skuldu brúka tær 780 síðurnar av tilfari, ið Coughlan hevði fingið frá høvuðsmekanikaranum hjá Ferrari, Nigel Stepney.

### Illur forseti

Max Mosley forseti í FIA, legði harðliga eftir liðstjóranum hjá McLaren, Ron Dennis, ið sambært FIA visti um njósnaratilfarið. Ein sjónliga illur, Mosley segði, at tað var hugstoytt at uppliva, at ein maður, ið tú hevur kent í 30 ár stendur og lýgur upp í andlitið á tær, og sigur, at hann einki kennur til nakra njósning, fyri síðan at verða avdúkaður. Sambært bretskum miðlum er McLaren liðið varisligt við at úttala seg, og rindar væntandi bótina uttan at muta ímóti.

# U19-kvinnur til Noregs

**U19-landsliðið í kvinnuflogbólti fer nú til Noregs, har tær skulu kappast um NM-heitið**

FLOGBÓLTUR
*Tíðindaskriv*

Kappingin verður leikt í Randaberg í Noreg beint uttanfyri Stavanger, og eru Føroyar í bólki við Noreg og Onglandi, sum er gestalið í kappingini.

Í hinum bólkinum eru Danmark, Svøríki og Ísland.

Føroyska liðið var eisini við til hesa kapping í fjør ár, og tá endaður tær á 4. plássi frammanfyri Ongland og Ísland, sum Føroyar vunnu ávikavist 3-2 og 3-0 á.

Liðið tapti tá 3-0 ímóti Noreg, men vunnu 1 sett ímóti bæði Danmark og Svøríki.

Fysti dysturin hjá Føroyum verður fríggjamorgunin ímóti Noreg, og næsti dysturin verður leygarmorgunin móti Onglandi.

Á Føroyska liðnum eru:Elsa Nielsen, Ruth Thomassen, Annika á Stongum, Helga Guttesen, Birgit Guttesen, Unn Petursdóttir, Kate Kalsø, Eina Kalsø, Sóley Poulsen, Ella Joensen, Sólvá Dimon og Katrin Petersen.

Venjarar eru Magnus Tausen og Niclas Joensen.



Skála-B71 0-0:

# Stórt fýrverkarí á Skála

**Serliga sandoyingar høvdu málmøguleikar í 1. hálvleiki, men hvørgin parturin skoraði í uppgerð, sum var eyðkend av, at lyklaspælarar noyddust at taka seg aftur orsaka av skaðum**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

*Skála*

*B71*

Eitt stig í part og einki mál. Tað var úrslitið, eftir at Skála og B71 høvdu stríðst í hálvan anna tíma í uppgerð, sum var undirhaldandi, hóast eingi mál vórðu skorað, og sum hevði havt uppiborið, at mál vórðu skorað.

B71 er framvegis í evarska lítlum vanda fyri at flyta niður. Um tað skuldi gingið heilt av skriðuni, og B71 um ein stóran mánað noyðist tungu leiðina niður í næstbestu deildina, so er skjótt at finna stigini, sum kundu havt bjargað temum sessin í bestu deildini.

Serliga í 1. hálvleiki vóru sandoyingar grammir og uppsettir, meðan heimaliðið tóktist sera lítið avgjørt.

Clayton Soares, sum annars plagar at vera ógvuliga tryggur, misnýtti úr góðari støðu, tá ið hann sendi við síðuna av málinum, og tað gjørdu eitt nú ungu menninir Rasmus Nielsen og Gudmund Nielsen eisini.

Fyrsta hálva tíman spældu sandoyingar fótbólt, og teir fingu loyvi at spæla á stórum parti av vøllinum. Heimaliðið lá aftarlaga, og tá ið skálamenn fingu fatur á bóltinum, so var tað so skjótt, at teir servaðu hann yvir aftur á mótstøðuhálvuna, har tað so var luturin hjá Boga Gregersen og Debus Danielsen at jagstra bóltin. Tað vóru vánaligar fyritreytir hjá álopsspælarunum, og B71 var skjótt aftur á kroppinum á Skálaverjuni.

Síðsta korterið undan steðginum fótaði heimaliðið sær, og í 2. hálvleiki, tá ið skálamenn høvdu fríska lotið undan, vóru teir væl betri við, enn teir høvdu verið.

Tá ið tað restaðu tjúgu minuttir var um reppið, at Skála legði seg framum, men stútarin hjá Debusi Danielsen fór omanfyri málið. Alexandur Johansen hevði eisini góðan møguleika at skora fyri heimaliðið.

Í hinum endanum var B71, eftir at lítið korter var farið av 2. hálvleiki, um reppið at fáa mál, men bólturin brast í stólpan.

Fyri báðar partar kom tað illa við, at stuðulsspælarar noyddust av vøllinum, tí teir vóru skaddir. Miðskeiðis í 1. hálvleiki noyddist Skála liðformaðurin, Pauli G.Hansen, at taka seg aftur, eftir at hann í nærdysti var vorðin skaddur. Á vøllin í staðin fyri hann kom Slavisa Kaplanovic, sum hevur havt ilt við at vinna sær fast pláss á liðnum.

B71 toppskjúttin, Clayton Soares, noyddist fimm minuttir undan steðginum at taka seg aftur. Í hansara stað kom blaðungi René Clementsen, sum ikki hevur spælt á besta liðnum.

- Tað er torført at seta seg upp, tá ið støðan hjá okkum er, sum hon nú er. Vit fara hvørki uppeftir ella niðureftir, staðfestu skálamenn.

- Sjálvandi iðra vit okkum um, at tað ikki eydnaðist at fáa mál burturúr góðu møguleikunum. Men hugburðurin var góður, og tað hevur stóran týdning, tá ið vit hugsa, hvussu gongdin hevur verið seinastu ferðirnar, staðfestu sandoyingar.